## Clinton avdúkaði seg



Um vikuskifti var fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton í Kosovo, har hann avdúkaði eina standmynd av sær sjálvum. Standmyndin er í høvuðsstaðnum Pristina, og fleiri túsund kosovo-albanar vóru komnir at síggja fyrrverandi forsetan avdúka standmyndina, sum stendur við ein nýggjan veg, sum eisini ber hansara navn. Kosovo-albanararnir virða Bill Clinton sum hetju, tí hann fekk NATO at bumba mál í Serbia fyri at noyða serbar at gevast við álopunum í Kosovo.

## Steinar rapladu yvir ferðafólk

Í minsta lagi tvey fólk lótu lív, tá steinar rapladu niðuryvir ferðafólk á eini baðistrond á frítíðaroynni Tenerifa á Grand Kanaria í dag. Onnur tvey ferðafólk kunnu vera endað undir grótrúgvuni, sum stóðst av omanlopinum. Hendingin fór fram í býnum Playa de los Gigantes um 16-tíðina lokala tíð í dag. Býurin er umtóktur millum ferðafólk úr Norðurevropa. Tey tvey fólkini, sum eru funnin deyð, eru ein 34 ára gamal spaniumaður og ein 55 ára gamal breti. Tað er lokalavísin, La Opinion de Ternerife, sum ber tíðindini um hendingina. Eini 150 bjargingarfólk eru við í upprunningararbeiðnum. Sum skilst, eru nógvir norðurlendingar í økinum, men sambært fjølmiðlum bendir einki á, at fólk eru saknað.

# ssu stuðulin skal brúkast







Á pallinum í Norðurlandahúsinum vóru Føroya Symfoniorkestur umframt nógvir av okkara fremstu tónleikarum.

### Endamálið rokkið

- Endamálið við innsavningini er rokkið, og vit takka einstaklingum, feløgum og fyritøkum fyri allan tann peningaliga stuðul, vit hava fingið.

Tað sigur ein ovurfegin formaður í Krabbameinsfelagnum, Jákup N. Olsen.

Hann vísir á, at ein partur av innsavningini fer at geva føroyingum eina størri vitan um Krabbameinsfelagið og um krabbamein sum sjúku.

- Tað hevur eydnast okkum í góðum samstarvi við miðlarnar at viðgjørt krabbamein og ávirkanina á sjúklingar og avvarðandi. Eisini hava tær ymisku verkætlaninar í landsinnsavningini viðvirkað til, at fleiri í dag vita meira um Krabbameinsfelagið og um krabbamein, sigur hann.

### Ymisk tiltøk

Formaðurin sigur, at lýsingin á mjólkarpakkunum hjá MBM um innsavningina man vera ein hin mest sædda lýsingin fyri ”Føroyum móti krabba”. Umframt at hjálpa við at gera vart við innsavningina, læt MBM eitt 10 oyra fyri hvønn seldan mjólkarpakka í oktober til Krabbameinsfelagið.

Hann vísir eisini á, at 467 børn úr 25 skúlum teknaðu endan á ævintýrinum um ”Tær fýra heilivágirnar”, sum Rakel Helmsdal skrivaði. Umframt at hava gjørt eina framsýning við tekningunum, hevur Krabbameinsfelagið við stuðli frá Føroyaprenti latið gera ein kalendara við 12 av tekningunum, sum nú fáast til keyps.

- Umleið 200 8. flokksnæmingar úr 6 skúlum hoppaðu band móti krabba í hoppikappingini hjá Kringvarpinum.

Umframt at næmingarnir fingu pulsin upp og fingu mýkt flennivøddarnar, savnaðu hoppini 70.000 krónur til felagið.

Hann vísir á, at 13 uppskot vóru til sjónvarpslýsingina.

### Leggja ætlanir

- Vit fara nú at at leggja ætlanir fyri, hvussu stuðulin kann koma flest møguligum til góðar, sigur formaðurin í Krabbameinsfelagnum, Jákup N. Olsen.

# Málningur til sølu eina viku aftrat



**Sølan av málninginum, sum Miðlahúsið hevur latið Krabbameinsfelagnum, verður á uppboði í eina viku aftrat – fram til komandi mánamorgun. Boðið upp á málningin er í løtuni 10.000 krónur**

INNSAVNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Av tí, at sms-skipanin í sambandi við uppboðssølu av málninginum, sum starvsfólkini í Miðlahúsinum hava málað og hava latið Krabbameinsfelagnum sum gávu, ikki hevur riggað so væl, er gjørt av, at høvið verður at bjóða upp á málningin í eina viku aftrat – ella fram til mánamorgunin komandi.

Tey, ið vilja bjóða uppá málningin, kunnu senda sms til nummar 1940 og skriva mal og síðani upphæddina, t.d. mal 1000. Tey, sum kanska heldur vilja geva eitt boð um teldupost, kunnu senda e-post til marknaðarleiðaran á Rás2, Birgir W. Høgnesen, birgir@ras2.fo og geva eitt boð.

Boðið upp á málningin er í løtuni 10.000 krónur.

EAG-Innramming hevur gjørt rammu um málningin, og hetta er samstudis ein gáva frá EAG til Krabbameinsfelagið.

Tá Krabbameinsfelagið fekk málningin frá starvsfólkunum í Miðlahúsinum, var hann ikki í rammu.

Tá Andras Godtfred frætti um málningin, setti hann seg í samband við Jóannes Andreasen, sum var partur av fyrireikingunum í Norðurlandahúsinum til stóra tiltakið innsavningartiltakið.

Andras vildi fegin geva Krabbameinsfelagnum eina ókeypis innramming og syrgdi soleiðis fyri, at málningurin, sum nú verður á uppboði í eina viku aftrat, fekk sína snotuligu rammu.

Allur peningurin, sum kemur inn fyri málningin, fer óskerdur latin Krabbameinsfelagið.